MENTAMÁLARÁÐIÐ

Dagfesting: 16. juni 2016
Tygara ref.:
Máltal: 16/00787-3

# Reglugerð fyri Rásina

## Endamálsgrein

### §1

### Navn og heimstaður

Skúlatilboðið ber heitið Rásin og er ein samdøgursstovnur til ung við menningartarni. Rásin er stovnur undir Mentamálaráðnum við heimstaði í Runavíkar Kommunu, Heiðavegur 67, 600 Saltangará.
*Stk. 2.* Næmingarnir búgva á Rásini í skúlatíðini, tó ikki í heyst-, jóla-, páska- og summarfrítíðini.
*Stk 3.* Næmingarnir hava atgongd til felagshøli.

### §2

### Skipan

Skúlatilboðið Rásin er skipað samsvarandi § 1 í løgtingslóg nr. 67 frá 2. mai 2003 um skúlatilboð til ung við breki, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 87 frá 22. mai. 2015.
*Stk. 2.* Skúlatilboðið Rásin verður skipað sambært ásetingunum í lógini.

### §3

### Málbólkur

Málbólkurin er ung við menningartarni, ið eru liðug við fólkaskúlan.
Stk. 2. Menningartarnið kann vera ymiskt, men ynskiligt er, at næmingarnir eru á nøkulunda sama menningarstøði.

Hoyviksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
+298 30 65 00 • +298 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

## §4

## Endamál

Endamál stovnsins er, at tey ungu fáa ment sínar førleikar, so tey eftir lokið skúlatilboð kunnu liva eitt sjálvstøðugt lív bæði persónliga og sosialt, í arbeiðslívi og lestrarlívi.
*Stk 2.* Skúlatilboðið skal geva næmingunum møguleika at menna sosialar, persónligar og kensluligar førleikar og at ogna sær fatan um lívið og tess møguleikar.
*Stk. 3.* Næmingarnir skulu hava fjølbroyttar menningarmøguleikar, sum styrkja teirra sjálvsálit, sjálvsvirði, og gera teir tilvitaðar um egnar møguleikar og avmarkingar, so teir betur kunnu meistra at hava ávirkan á egið lív.
*Stk. 4.* Skúlatilboðið skal miða ímóti at varðveita netverkið hjá næminginum, so at næmingurin m.a. kann knýta nýggj vinarbond.
*Stk. 5.* Stovnurin skal eftir tørvi veita næminginum ráð og hjálp, tá ið næmingurin fær vitjan og fer á vitjan, og hjálpa næminginum at kunna avvarðandi, hvat hendir á Rásini.

## §5

## Innihald í skúlatilboðnum

Skúlatilboðið skal hava eina greiða skipan, ið er karmur um samlaða menningararbeiðið á stovninum.
*Stk. 2.* Rásin veitir næmingunum eitt heildartilboð, sum umfatar búðstað, arbeiði og fakliga menning.
*Stk. 3.* Innihaldið er í høvuðsheitum verklig læring og menning við støði í førleikunum hjá tí einstaka.
*Stk. 4.* Skúlin leggur dent á, at næmingarnir læra um heilsugóðan kost og rørslu í ástøði og praksis.
*Stk. 5.* Arbeitt verður m.a við hesum økjum:

1. næmingarnir menna sínar sosialu førleikar, sum eru umráðandi bæði í einum búfelagsskapi, í arbeiði og at kunna knýta vinarbond.
2. næmingarnir menna sínar fakligu førleikar, læra at seta orð á tað, sum er teirra áhugi, og fáa alsamt hóskandi krøv, so teir alt skúlaskeiðið eru í eini menningartilgongd, har dentur verður lagdur á, at næmingarnir gerast førir fyri at skapa sær lívsinnihald og lívsgóðsku.
3. virðing sum grundleggjandi førleiki fyri menning, har næmingurin bæði kennir seg virdan og dugir at virða seg sjálvan og onnur.
4. næmingarnir luttaka í verkligum arbeiðsgongdum bæði innan- og uttanhýsis, so teir gerast førir fyri at klára seg sjálvar bæði persónliga og í arbeiðslívi.
5. næmingarnir luttaka í frítíðarlívi t.d. handaligum arbeiði, heilsufremjandi tilboðum innan kost og rørslu og í mentanarligum tiltøkum.
6. næmingarnir skulu læra um persónlig, búskaparlig og samfelagslig viðurskifti, so teir kenna reglurnar fyri einum vanligum lívi bæði í heimi og samfelag.
7. stovnurin skal á hvørjum ári gera eina heildarmeting av tí einstaka næminginum og eina menningarætlan fyri komandi árið og hvørt menningarátak.

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ☏ +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

8. annað árið arbeiða næmingarnir við eini framtíðarætlan fyri m.a. bústaði,skúlagongd,læruplássi ella yrki.

## §6

## Starvsfólk

Starvsfólk skulu hava fakliga útbúgving, ið ger tey før fyri at skipa menningartilgongd fyri einstaka næmingin.
*Stk. 2.* Starvsfólk eiga at kunna seg um og leita sær vitan um tær avbjóðingar, ið næmingarnir hava.
*Stk. 3.* Starvsfólk skulu vera kontaktfólk hjá einum ella fleiri næmingum.
*Stk 4.* Kontaktfólkið skal taka sær av áhugamálum hjá næminginum og syrgja fyri, at næmingurin hevur møguleika fyri persónligum samskifti og samveru við starvsfólk.
*Stk. 5.* Starvsfólk skipa saman við leiðsluni fyri felags foreldrafundi í minsta lagi eina ferð árliga og foreldraviðtalu, tá støðulýsing og menningarætlan er gjørd fyri komandi árið.

Stk 6. Arbeiði í stovninum skal skjalprógvast í góðkenda teldukervinum fyri Rásina.

## §7

## Upptøka og útskriving

Avgerð um upptøku tekur visitatiónsbólkurin sær av sambært løgtingslógini, og útskriving í úrtíð tekur leiðarin á Rásini saman við ráðgevandi bólkinum støðu til í hvørjum einstøkum føri.

Upptøka í úrtíð fer fram eftir bíðilista, sum fyriliggur, og tekur ráðgevandi bólkurin avgerð um upptøku í hesum føri.

## §8

## Leiðsla

Landsstýrismaðurin setur leiðara, sum hevur dagligu leiðsluna og ábyrgdina av virkseminum á stovninum.
Stk. 1. Leiðarin hevur námsfrøðiligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina mótvegis landsstýrismanninum.
Stk. 2. Leiðarin setur starvsfólkini á stovninum.

Stk 3. Leiðarin setur saman við avvarðandi myndugleika varaleiðara.

Stk 5. Leiðarin eigur at kunna/upplæra varaleiðaran um øll viðurskifti á stovninum.
Stk. 6. Leiðarin skipar á hvøjum ári fyri felagstiltøkum fyri næmingum og foreldrum.

Hoyviksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
+298 30 65 00 • +298 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

## §9

## Fíggjarætlan og næmingagjald

Leiðarin á stovninum ger uppskot til fíggjarætlan, sum verður send Mentamálaráðnum í sambandi við árliga uppskotið til fíggjarløgtingslóg.
*Stk. 2.* Næmingarnir rinda fyri at búgva á Rásini samsvarandi reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur.
*Stk.3.* Lóg og reglur um Landsins játtanarskipan, um roknskaparverk landsins og landsgrannskoðan eru galdandi fyri stovnin.

## §10

## Eftirlit

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur yvirumsjón við stovninum.
*Stk. 2.* Ráðgevandi bólkurin skal javnan meta um skúlatilboðið, geva landsstýrismanninum ráð og kunning um skúlatilboðið og skal á hvørjum ári lata landsstýrismanninum frágreiðing um gongdina.

## §11

## Gildiskoma

Henda reglugerðin kemur í gildi frá 1. mai 2016 og kemur ístaðin fyri reglugerðina fyri Rásina 1. mars 2012.

Tórshavn 16. juni 2016

Mentamálaráðið

Rigmor Dam
*landsstýriskvinna*

/Poul Geert Hansen
*aðalstjóri*

Hoyviksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
+298 30 65 00 • +298 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo